# Jóannes Nolsøe á konsertferð

**Orgulkonsert í Fuglafjarðar kirkju týskvøldið 11. juni kl 20:00**



ORGULKONSERT
*Tíðindaskriv*

Jóannes Nólsøe fer at hava fýra orgulkonsertir í næstum í Føroyum. Tann fyrsta verður í Christianskirkjuni leygardagin 9. juni kl. 16:00, Fuglafjarðar kirkju týsdagin 11. juni kl. 20:00, í Vesturkirkjuni hósdagin 13. juni kl. 20:00 og í Vágs kirkju sunnudagin 16. juni kl. 16.

Jóannes tók lærara-prógv frá Føroya Læraraskúla í 1967, var lærari í mong ár í Kommunuskúlanum í Havnini og í Vágs skúla. Hann var á málskeiði í Týsklandi 71- 1972, árskeiði á DLH 76 - 77 í sangi og tónleiki, organistur í Havnar kirkju frá 70 - 1983, Vágs kirkju 83 - 97, á tónlistaskúlanum í Trondhjem 89 - 1991 og organistur í Hulsig kirkju og hjálparorganistur í Skagens kirkju frá 1997.

**Konsertkrá:**

| | |
|---|---|
| J. S. Bach (1685-1750): | Præludium, G-dur |
| César franck (1822-1890): | Fantaisie, C-dur op. 16 |
| D. Buxtehude ( 1637-1707): | Vit halgan anda biðja nú<br>Præludium, E-dur (BuxWV 141) |
| W. A. Mozart (1756 - 1791): | Andante, F-dur (K 616) |
| H. J. Højgaard (1904-1992): | Á morgni árla vit Guði lova |
| J. Waagstein (1879-1949) | Signaða sól |
| J. Waagstein: | Vár við lýggjum vindi |
| J. Waagstein: | Tíðin rennur sum streymur á |
| J. S. Bach (1685-1750): | Præludium og fuga, G-dur (BWV 541) |

Jens Mortan Mortensen setti tey føroysku løgini hjá H. J. Højgaard og Jógvan Waagstein út fyri orgul.

# Nýggj Blá Bók

ÚTGÁVA
*Turið Kjølbro*

Gott og væl 200 danir afturat hava fingið heiðurin at koma í nýggjastu útgávuna av Kraks Blå Bog 2002/3, sum kom út fríggjadagin í farnu viku. Kraks Blå Bog er mest endurgivna handbókin í Danmark og er komin út á hvørjum ári síðani 1910. Í nýggjastu útgávuni eru sostatt 7938 fólk nevnd og umrødd, danir, grønlendingar og føroyingar, sum eru á lívi í dag. Millum tey 212, sum hesa ferð eru sloppin upp í part, kunnu vit nevna Sebastian, sangara og tónasmið, Sanne Salomonsen, sangara, Naser Khader, fólkatingslim, Mette Fugl, journalist, Elsebeth Egholm, journalist og rithøvund, Tove Fergo, krikjumálaráðharra og prest, og Nicolaj Kopernikus, sjónleikara.

Bókin kostar umleið 1265 krónur.

# Mentanarnátt í SMS

MENTANARNÁTT
*Tíðindaskriv*

Í kvøld, fríggjadagin 7. juni hava handlarnir í SMS opið til kl. 24.00 - tó hevur Miklagarður bert opið til kl. 20.00.

Hetta serliga titlak hevur verið nýtt í londunum kring okkum í fleiri ár.

Vit í Havnini royndu hetta fyrstu ferð í fjør.

Tá eydnaðist tiltakið serstakliga væl. Undirhald var á Torginum frá seint seinnapartin til beint eftir kl. 23.00, og húsið var á tremur við fólki allan dagin; heilt fram til eftir miðnátt. Eins og í fjør verður hetta kvøldið rópt, Mentanarnáttin.

Aftur í ár vera nógv mentanarlig tiltøk á Torginum og annars í SMS í sambandi við Mentanarnáttin.

Tiltøkini byrja kl. 16.00, tá ið klovnurin Hannibal, sum vit øll kenna, og ikki minni kenda systkinabarn hansara, Nøffélina, undirhalda á pallinum. Kl. 18.00 fara Fjotti og Bobo at undirhalda fyri børnum og ungum.

Kl. 19.00 verður tann í Føroyum heimskendi sangarin, Brandur Enni, á pallinum. Hann fer at syngja løg úr nýggju fløgu síni "Waiting in the Moonlight". Beint eftir framførsluna skrivar hann autografar í 3-arinum.

Seinni sama kvøldið verður tónleikur og annað undirhald fyri bæði ung og eldri á skránni. Tá fara m.a. Jens Marni, Pauli og Ólavur, Janus og Vagnur, leikarar úr leikbólkinum Spírum og onnur á pallin, sum er settur upp á einum avmarkaðum øki av Torginum. Kl. 21.30 verður eisini upplestur og sangur í Bòkasøluni. Millum teirra verða Unn Patursson, sum syngur egnar sangir, Sólrun Michelsen lesur upp og næmingar á skriviskeiðinum hjá Rakel Helmsdal lesa egnar tekstir.

Í sambandi við tiltakið verða borð og stólar settir upp á Torginum, soleiðis at tey vitjandi kunnu seta seg niður við einum kaffimunni ella onkrum øðrum úr Perluni.

**Skráin:**

Kl. 16.00:
Klovnurin Hannibal og systkinabarnið Nøffélina undirhalda

Kl. 17.00:
Klovnurin Hannibal og systkinabarnið Nøffélina undirhalda

Kl. 17.30:
Føroya Klarinettorkestur spælir

Kl. 18.00:
Fjotto og Bobo undirhalda

Kl. 19.00:
Brandur Enni syngur. Hann Skrivar autografar í 3-arinum aftaná.

Kl. 20.00:
All That Rain spæla

Kl. 21.00:
Jens Marni, Pauli Magnussen og Ólavur Øster spæla

Kl. 21.30:
Sangur við Unn Patursson og upplestur við Sòlrun Michelsen og næmingum hjá Rakel Helmsdal í Bókasøluni!

Kl. 22.00:
Leikarar úr leikbólkinum Spírum framføra skemt

Kl. 23.00:
Janus Kampmann og Vagnur Streymoy syngja og spæla

Hygg eisini á www.sms.fo
http://www.sms.fo

# Samtíðarlist og bókaverk

**Stóra árliga summarframsýningin letur upp í Norðurlandahúsinum í morgin og í hesum sambandi er vakurt bókaverk komið út**

LIST
*Turið Kjølbro*

Í annað kvøld letur árliga summarframsýningin upp í Norðurlandahúsinum í Havn. Framsýningin eitur Sjón í havi, telur átta listafólk, ið umboða nútíðarlist, fýra teirra búgva uttanlands. Í tíðindaskrivi verður sagt, at í ár er dentur lagdur á at vísa list, sum umboðar tað nýggja, sum vísir fram eftir og er nýskapandi. Øll átta myndlistafólkini eru uppi í okkara mest etableraðu listafólkum, ið vísa sína list bæði her heima og úti í verðini. Tað er sjáldsamt at síggja eina so stóra framsýning við samtíðarlist her á landi. Tey mætastu av teimum, sum ganga nýggjar leiðir, fylla at kalla alt Norðurlandahúsið.

Í forhøllini sýna Hans Pauli Olsen og Hansina Iversen fram. Hann tvær gyltar standmyndir við sveimandi menniskjakroppum í stórari stødd, og hon sansaligar og kenslubornar myndir. Dansistovuna býta Hanni Bjartalíð og Sigrun G. Niclasen ímillum sín. Hann sýnir fram sínar smáu málningar av menniskjafigurum og hon sermerktu málningar við súmbolum og dreymum.

Astri Luihn sýnir fram í Klingruni myndir, málaðar á linoleumsplátur, vakrar og inniligar. Eyðun av Reyni og Kári Svensson fylla stóra veggin í Klingruni við stórfingnum málningum, og at enda Anker Mortensen innast í Klingruni við eyðkenda, nýskapandi myndamáli.

Summarframsýningin er opin til ólavsøku. Tá fer hon út at ferðast. Leiðin gongur til Íslands, Svøríkis, Álands og Týsklands.

**Bókaverk**

Í sambandi við hesa forkunnugu framsýningina, verður bókaverk givið út á trimum málum um hesi átta listafólkini, sum Eva Furseth hevur skrivað. Eva er listafrøðingur. Hon er uppvaksin í Vestmanna, hevur føroyska mammu og norskan pápa. Í dag starvast hon sum myndlistafrøðingur á stóra savninum fyri altjóða og norska samtíðarlist í Oslo, sum eitur Museet for Samtidskunst.

Fyrst í bókini er almennur inngangur um menningina í føroyskar myndlist. Har sigur høvundurin eitt nú, at samtíðarlistin í Føroyum er óvanliga rík, tá ið hugsað verður um, at bara sløk 48.000 fólk eru í Føroyum og at myndlistin ikki sá dagsins ljós í Føroyum fyrr enn seinast í 1800-talinum. Høvundurin lýsir síðani tey átta fólkini og avrik teirra í teksti og myndum. Malan Johannesen hevur týtt til føroyskt og Chris Saunders til enskt. Vasti í Klaksvík hevur staðið fyri grafiska designinum og Norðurlandahúsið í Føroyum er útgevari. Bókin kostar 100 krónur.

Summarframsýningin og Mentanarnátt í Norðurlandahúsinum verður í annaðkvøld 7. juni kl. 22.00. Karin Kjølbro, forkvinna í stýrinum í Norðurlandahúsinum, letur framsýningina upp, og Magnus Johannesen trio spælir.

# Syngjandi frændur á vitjan

SANGUR
*Tíðindaskriv*

Mikudagin komu 41 fólk frá Kirkjukórinum á Ólavsvík á Suðurlandinum í Íslandi til Føroya. Ferðin kom í lag, tá ið Vestmanna kirkjukór í mai 2001 vitjaði føroysku dagarnar á Ólavsvík.

Ferðalagið fór hósdagin útferð í Eysturoynni og í Norðstreymi, eitt nú fóru tey til Gjár, Gøtu, Elduvík og Kollafjørð.

Í dag er ætlanin at vitja ymsastaðni í gomlu Havnini, har Heri Joensen, prestur, sum hevur íslendska konu, fer at vísa teimum runt.

Í morgin, leygardagin kl 17 fer kórið at hava eina almenna kirkjukonsert í Vesturkirkjuni.

Sunnudagin verður allur dagurin nýttur í Vestmanna, sum eisini er vinarbýur hjá Ólavsvíkar kommunu. Vestmanna kirkjukór og Kirkjukórið úr Ólavsvík koma í felag at syngja undir gudstænastuni í Vestmanna kirkju. Prestarnir i Vestmanna og í Ólavsvík fara í felag at hava gudstænastuna. Á middegi bjóðar Vestmanna Kommuna gestunum úr Ólavsvík ábit. Gestirnir eru bodnir undir Vestmannabjørgini, og út á dagin verður almenn konsert í skúlaaulini.

Mánadagin fer ferðalagið aftur til Ísland.



Skúlin við Ósánna:

# Breytir endaðu

**Seinasta fríggjadag endaði breytararbeiðið í skúlanum við Ósánna við einum tiltaki, har lagt varð upp til, at allar fýra breytirnar komu við hvør sínum ískoyti til endaløtuna**

BREYTIR
*Solby A. Eliasen*

**Klaksvík:** Hetta brátt farna skúlaárið hava fýra breytir koyrt, sum ein partur av tíggjunda flokki í skúlanum við Ósánna. Ein Samfelags- og Húsarhaldsbreyt, ein Ítróttarbreyt, ein Handverk og List breyt og ein KT breyt.

Tey hava arbeitt við ymiskum gjøgnum árið. Til sjálva endaløtuna hevði Handverk og List breytin dekkað eitt borð. Tey høvdu gjørt alt sjálvi, dúkar, borðprýði og alt, sum har til hoyrir.

- Tað sá virkuliga gott út hjá teimum. Eitt sindur rokaligt, men ordiliga ungdómsligt, sigur Tina Purkhús, ein av breytalærarunum. Hon leggur dent á, at tað skuldi verða nakað, sum tey sjálvi høvdu gjørt, og tað besta við tí var, at tað sást aftur í stílinum.

Samfelags- og Húsarhaldsbreytin gjørdu so matin til løtuna. Og tað var ikki eiti á. Tey gjørdu mat úr einum seyði, sum tey sjálvi vóru við til at fletta í heyst.

Kristina Lutzen, lærari í Húsarhaldsbreytini, greiðir frá, at tey gjørdu blóðpylsu og rullupylsu og tílíkt beinanvegin tá, men so ístaðin fyri at heingja kjøtið upp, so frystu tey tað. Og nú varð tað so uppaftur tikið. Og tey fingu væl burturúr. Við góðari hjálp frá einum av teirra lærarum, sum eisini er útbúgvin slaktari, høvdu tey útbeinað eitt tjógv og ein bógv, og skóru páleggið niður á føt. So høvdu tey eisini kjøtfars við hvítleyki og reyðum piparfruktum, sum var koyrt í páleggið. Tá hevði onkur skemtandi tikið til, hvar hesin seyður mundi havt gingið, síðani tað vóru reyðar piparfruktir í. Eisini høvdu tey bakað pitabreyð, bollar og annað gott.

Men ikki kundi tey bara eta og eta, tey máttu eisini røra seg eitt sindur, og tað tók Ítróttarbreytin sær av. Tey høvdu millum annað ein sang, sum tey kallaðu "motiónssangurin".

KT breytin hevði í gjøgnum alt árið millum annað arbeitt nógv við myndum. Tey høvdu tikið myndir av øllum breytararbeiðinum í gjøgnum skúlaárið. So høvdu tey lært seg at nýta eitt forrit á telduni, har tey kundu broyta myndirnar og útsjóndina á teimum, sum vóru á myndunum.

- Tað var sera stuttligt at síggja, hvussu nógv fólk vóru broytt. Summi kendu vit als ikki aftur, greiðir Tina frá.

So KT breytin hevði eina lítla myndaframsýning fyri floksfeløgum og lærarunum.

Tíggjunda flokkarnir hava seinasta skúladag í dag, og so verður farið í holt við próvtøkurnar. Prógvini verða handað hóskvøldið 27.06.02.



*Endaløtan varð hildin inni í eini av skúlastovunum hjá tíggjunda flokkunum*

**Arbeiðið gingið væl**

Tina Purkhús sigur, at øll, sum hava verið við í breytararbeiðinum – tað veri seg bæði lærarar og næmingar - lata væl at, so tað verður heilt avgjørt á skránni komandi skúlaár. Hetta var fyrstu ferð, at tílíkt breytararbeiði er roynt á skúlanum við Ósánna, so tað sigur næstan seg sjálvt, at onkrar smáar broytingar verða til komandi ár.

- Men leisturin verður so í øllum førum tann sami, sigur Tina Purkhús at enda.

# Tríggir fyrstu flokkar í summar

**62 børn fara í fyrsta flokk í Klaksvík komandi skúlaár**

SKÚLI
*Solby A. Eliasen*

**Klaksvík:** Tað verða sostatt tríggir fyrstu flokkar, tá skúlarnir byrja aftur mánadagin 19. august. Tveir verða í skúlanum á Ziskatrøð og ein í skúlanum við Ósánna. Fyrstu flokkarnir í skúlanum á Ziskatrøð ganga í skúla fyrrapartar, meðan tey í skúlanum við Ósánna eru í skúla seinnapartar. Hetta kemur av hølistrupulleikum. Fyrstu og annar flokkarnir í skúlanum við Ósánna deilast um skúlastovurnar, og tí er ikki gjørligt at hava fyrsta flokk um morgunin eisini. Tað eru í dag tveir annar flokkar í skúlanum.

Børnini, sum skulu byrja í fyrsta flokki fara tó ikki í skúla fyrr enn mikudagin 21. august, meðan hini børnini sum nevnt fara 19. august.






I Rederiet A.P. Møller får du en maritim lederuddannelse med en verden af muligheder.

Maritim Lederuddannelse

**Officersaspirant hos A.P. Møller**

DU søger udfordringer og karrieremuligheder i et internationalt miljø
- har hænderne og hovedet skruet rigtigt på
- har en studentereksamen, HTX, HF eller HHX med matematik eller tilsvarende gymnasialt niveau.
- er i almindelig god fysisk form og ikke farveblind

VI tilbyder dig en udfordrende og afvekslende uddannelse og karriere som skibsofficer og kommende Maritim Leder i Rederiet A.P. Møller.

Uddannelsen kan påbegyndes d. 29. juli 2002 samt primo januar 2003, og foregår som en kombination af teoretisk uddannelse ved Svendborg International Maritime Academy (SIMAC) og sejlpraktik i Rederiets skibe.

Rekvirer materiale og ansøgningsskema ved:

**A.P. Møller Marine Department**
Telefon +45 63 21 21 00
E-mail: cadet@maersk.com

Eller besøg vores hjemmeside med information og ansøgningsformular: www.maritim-leder.dk

Rederiet A.P. Møller beskæftiger over 60.000 medarbejdere og har kontorer i mere end 100 lande.

A.P. Møller flåden tæller over 250 skibe på omkring 12 millioner tons dødvægt, og omfatter container-, tank-, bulk- og forsyningsskibe, samt specialskibe og borerigge.

MÆRSK